# Judo-úrslit

**Annað umfar av liðkappingini í judo varð leikt í Havn sunnudagin.**

JUDO
*Tíðindaskriv*

Í kappinigni hjá dreingjum eru sera nógvir luttakarar, so Havnar Judofelag hevði trý lið við í kappingini og Sunda Judofelag tvey

### Dreingir

HJFa - HJFb 5-0. Ebba Malena Debes Thomsen vann á Stefan J. Sigvardsen, Eirikur Jakupsson vann uttan dyst, David Nilssen vann á Jákup Lützen, Hanus Samró vann á Sjúrða Hoydal og Torvald Abrahamsen vann á Bjarti B. Thomsen. Havnar Judofelag a fekk 50 leikstig, meðan b-liðið onki fekk.

HJFa - HJFc 5-0. Ebba Malena Debes Thomsen vann á Símun H. Lützen, Eirikur Jákupsson vann uttan dyst, David Nilssen vann á Fríða E. Mikkelsen, Hanus Samró vann á Mads Andrias Poulsen og Torvald Abrahamsen vann á Andrias Høgenni. A-liðið fekk 50 leikstig, meðan c-liðið onki fekk.

HJFb - HJFc 3-1. Símun H. Lützen, HJFc, vann á Stefan J. Sigvardsen, Jákup Lützen, HJFb, vann á Fríða E. Mikkelsen, Sjúrður Hoydal, HJFb, vann á Mads Andrias Poulsen og Bjartur B. Thomsen, HJFb, vann á Andrias Høgenni. Leikstigini vóru 27-10.

HJFb -SJFa 1-4. Mark Borgardal, SJF, vann á Stefan J. Sigvardsen, Bjørn Andreasen, SJF, vann uttan dyst, Jákup Lützen, HJF, vann á Tróndi Kruse, Teitur Joensen, SJF, vann á Sjúrði Hoydal og Sigmund Dahl, SJF, vann á Bjarti B. Thomsen. Leikstigini vóru 10-40.

HJFa - SJFb 5-0. Ebba Malena Debes Thomsen vann uttan dyst, Eirikur Jákupsson vann á Brian Borgardal, David Nilssen vann á Edvard Johannesen, Hanus Samró vann á John Mortensen og Torvald Abrahamsen vann uttan dyst. Leikstigini vóru 50-0.

HJFc - SJFa 0-5. Mark Borgardal vann á símun H. Lützen, Bjørn Andreasen vann uttan dyst, Tróndur Andreasen vann á Fríða E. Mikkelsen, Teitur Joensen vann á Mads Andreas Poulsen og Sigmund Dahl vann á Andrias Høgenni. Leikstigini vóru 0-50.

HJFc - SJFb 2-3. Símun H. Lützen, HJF, vann uttan dyst, Brian Borgardal, SJF, vann uttan dyst, Edvard Johannesen, SJF, vann á Fríða E. Mikkelsen, John Mortensen, SJF, vann á Mads Andrias Poulsen og Andrias Høgenni, HJF, vann uttan dyst. Leikstigini vóru 20-30.

HJFb - SJFb 4-1. Stefan J. Sigvardsen, HJF, vann uttan dyst, Brian Borgardal, SJF, vann uttan dyst, Jákup Lützen, HJF, vann á Edvard Johannesen, Sjúrður Hoydal, HJF, vann á John Mortensen og Bjartur B. Thomsen, HJF, vann uttan dyst. Leikstigini vóru 40-10.

HJFa - SJFa 2-3. Mark Borgardal, SJF, vann á Ebbu Malenu Debes Thomsen, Bjørn Andreasen, SJF, vann á Eirikki Jákupsson, David Nilssen, HJF, vann á Tróndi Kruse, Teitur Joensen, SJF, vann á Hanus Samró og Torvald Abrahamsen, HJF, vann á Sigmund Dahl. Leikstigini vóru 17-30.

SJFa - SJFb 5-0. Mark Borgardal vann uttan dyst, Bjørn Andreasen vann á Brian Borgardal, Tróndur Kruse vann á Edvard Johannesen, Teitur Joensen vann á John Mortensen og Sigmund Dahl vann uttan dyst. Leikstigini vóru 50-0.

### Unglingar:

HFJ - SJF 3-2. Jógvan Páll Kristiansen, SJF, vann á Bjarti Clementsen, Rúni J. Johannesen, HJF, vann á Opor Thorleifsson, Heini Niclasen, SJF, vann á Marvin Jacobsen, Heini Poulsen, HJF, vann á David Carlsson og Jákup Andrias Thomsen, HJF, vann á Hjalmar Johannesen. Leikstigini vóru 30-20.

### Menn:

HJF - SJF 2-1. Alex Joensen, SJF, vann á Benny Ejdesgaard, Jákup Andrias Thomsen, HJF, vann á Sam Vang og Búgvi Poulsen, HJF, vann á Hjalmar Johannesen. Leikstigini vóru 13-10.



*Næsta umfarið av liðkappingini í judo varð leikt sunnudagin*

*Mynd: SJ*

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 VÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 411 | 251 | 160 | 16 |
| 2 Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 380 | 293 | 87 | 13 |
| 3 Neistin | 3 | 1 - 1 - 1 | 324 | 291 | 33 | 11 |
| 4 VB | 3 | 2 - 1 - 0 | 354 | 362 | -8 | 11 |
| 5 Kyndil | 3 | 0 - 0 - 3 | 338 | 396 | -58 | 3 |
| 6 StÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 255 | 319 | -64 | 3 |
| 7 Sóljan | 3 | 0 - 0 - 3 | 267 | 417 | -150 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 438 | 366 | 72 | 17 |
| 2 Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 469 | 393 | 76 | 14 |
| 3 StÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 395 | 370 | 25 | 10 |
| 4 H71 | 3 | 0 - 1 - 2 | 406 | 431 | -25 | 7 |
| 5 Tjaldur | 3 | 1 - 0 - 2 | 366 | 416 | -50 | 6 |
| 6 Kyndil | 3 | 1 - 1 - 1 | 342 | 395 | -53 | 5 |
| 7 KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 393 | 438 | -45 | 4 |

## Máltindarnir

### Kvinnur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskine | Sóljan | 126 | (18) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 125 | (36) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 107 | (47) |
| Gabriella Fekete | VB | 101 | (25) |
| Ioana Rápa | VÍF | 97 | (23) |
| Regina Radó | VB | 80 | (20) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 77 | (2) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 76 | (12) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 75 | (13) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 72 | (34) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 64 | (12) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 60 | (1) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 60 | (6) |
| Birita Wardum | Neistin | 59 | (10) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 58 | (1) |

### Menn:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jacob Jónsson | Neistin | 103 | (15) |
| Bjarni Wardum | H71 | 102 | (22) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 95 | (28) |
| Høgni Klein | Kyndil | 93 | (7) |
| Heini Joensen | Neistin | 92 | (25) |
| Ingi Olsen | VÍF | 84 | (10) |
| Finnur Hansson | H71 | 83 | (20) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 82 | |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 82 | (10) |
| Durica Tomic | KÍF | 81 | (21) |
| Sámal Joensen | VÍF | 80 | (13) |
| Iljan Topic | KÍF | 76 | |
| Áki Olsen | VÍF | 71 | (10) |
| Artur Johansen | StÍF | 67 | (5) |
| John Petersen | Neistin | 66 | (1) |

# Hálvur føroyingur í hitanum

**Eftir eina trupla byrjan er líkt til, at Claus Bech Jørgensen nú hevur vunnið sær fast pláss hjá Bradford í næstbestu ensku deildini**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Fyri viku síðani slapp Claus Bech Jørgensen fyri fyrstu ferð at byrja millum teir fyrstu ellivu hjá Bradford, og eftir øllum at døma gekst hendan royndin so hampuliga væl.

Í øllum førum var hálvi føroyingurin aftur hesa ferð millum teir fyrstu ellivu, tá Bradford leygardagin vitjaði Barnsley, sum eisini er í niðaru hálvu í deildini.

### Málríkt

Talan gjørdist um ein rættiliga málríkan dyst, har Jørgensen var á vøllinum í samfullar 90 minuttir.

Framman fyri knøppum 14.000 áskoðarum legði fyrrverandi Manchester United Stjørnan, Lee Sharpe, Bradford á odda, men tað var tó skjótt, at Barnsley svaraði aftur. Við málum frá Chris Lumsdon og Mike Sheron vunnu teir seg upp á 3-1, og leingi var líkt til, at hetta skuldi gerast endaliga støðan, men við tveimum málum í seinastu tiggju minuttunum eydnaðist tó Ashley Ward at javna fyri Bradford.

Bradford, sum í fjør spældi í Premier League, er nú á 16. plássinum í ensku 1. deild við 36 stigum fyri 29 dystir.



*Claus Bech Jørgensen tykist nú at hava vunnið sær fast pláss á liðnum hjá Bradford, sum spælir í næst bestu ensku deildini*



## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
## Ov nógv sild

Donsku ídnaðartrolararnir, sum royna eftir brisalingi í Norðsjónum, hava fingið so nógva sild í seinastuni, at danska fiskiveiðieftirlitið valdi at banna ídnaðarveiðini í stórum parti av Norðsjónum. Bannið kom í gildi sunnudagin, og tí lógu at kalla allir ídnaðartrolararnir í Esbjerg, Hanstholm, Thyborøn og Hvidesande við bryggju í gjár. Bara í Esbjerg lógu millum 30 og 35 skip inni.

Veiðibannið er galdandi í ein mánað, og tað fær ógvusligar avleiðingar fyri skipini og manningarnar, sigur formaðurin í fiskimannafelagnum í Esbjerg, Hans Aa., sum leggur afturat, at veiðisteðgurin fær eisini stórar avleiðingar fyri virkini á landið.

Fiskamjølvirkið Triple Nine Fishprotein, sum er taørsta av sínum slagi í Danmark, hevur boðað sínum keyparum frá, at teir fáa ikki meiri fiskamjøl haðani. Hans Aa sigur, at kemur eingin fiskur upp á land, er heldur einki arbeiði til teirra, sum arbeiða á virkjunum. Hann dugir annars væl at skilja avgerðina hjá myndugleikunum at steðga fiskarínum, men heldur, at veiðibannið er ov drúgvt.

Tað vóru kanningar hjá fiskiveiðieftirlitinum í Esbjerg, sum avdúkaðu, at ídnaðartrolararnir høvdu alt ov nógva sild sum hjáveiði. Tilsamans høvdu teir umleið 5.000 tons av sild.

Fyrr plagdu teir donsku ídnaðartrolararnir at fara í Ermasund at fiska rossamakrel um hesa tíðina, um ov nógv sild var uppi í brislinginum, men tað kunnu teir ikki longur, tí ta kvotuna hava trolararnir mist.

Danska fiskimannafelagið hevur biðið myndugleikarnar í Keypmannahavn um fund um støðuna. Tann fundurin verður síðst í mánaðinum, og til ta tíð verða trolararnir í hvussu er liggjandi við bryggju.

# Fara heimaftur hóast vanda fyri nýggjum gosi



*Mynd: Reuters*

**Altjóða felagsskapirnir, sum ætlaðu at hjálpa teimum, sum flýddu undan gosinum í Kongo, noyðast at broyta sínar ætlanir, tí fólk venda heimaftur, hóast vandi er fyri nýggjum gosi**

KONGO
*Árni Joensen*

Altjóða hjálparfelagsskapirnir høvdu sett sær fyri at byggja legur til til teirra, sum vóru rýmd undan gosinum við býin Goma, men í gjár vóru bara 5000 eftir av teimum umleið 400.000, sum vóru flýdd um markið til Rwanda.

Talsmenn hjá felagsskapunum siga, at fólk vilja ikki lurta eftir ávaringum um møgulig nýggj gos, og at tey heldur vilja sleppa heimaftur. Tey tykjast heldur ikki ávirkað av, at teir flestu vegirnir liggja undir í grótbræðingini, sum kom upp úr gosopinum. Fólk vilja sleppa heim fyri at vita, um húsini standa enn, siga talsmenn hjá hjálparfelagsskapunum.

Felagsskapurin World Vision segði í gjár, at næstan øll, sum flýddu úr býnum Goma, vóru farin heimaftur. Talsmaðurin legði afturat, at úrslitið er ein onnur kreppa, tí lítið og einki er eftir av býnum.

### Fleiri skjálvtar

ST heldur, at 45 fólk doyðu, tá gosfjallið Nyiragongo sendi eina flóðaldu av gløðandi gróti oman eftir líðunum seinasta hósdag, og serfrøðingar hjá ST halda, at vandi kann vera fyri nýggjum gosi.

Fleiri harðir jarðskjálvtar hava verið kring fjallið seinastu dagarnar, og júst hetta halda serfrøðingarnir vera eina fráboðan um, at fjallið kann fara at goysa aftur. Harafturat kemur eitrandi gass upp úr teirri storknaðu grótbræíngini.

Tey, sum eru komin aftur til Goma, hava lítið til matna, og har er næstan einki reint vatn. Fleiri hava fingið sær vatn úr Kivuvatninum, hóast myndugleikarnir hava ávarað um, at vatnið kann vera vandamikið at drekka, tí tað kann vera eitrað av grótbræðingini.

# Norðmenn fyri ES-limaskapi

**Ein nýggj meiningakanning í Noregi vísir, at 53 prosent taka undir við, at landið skal fara upp í ES**

NOREG
*Árni Joensen*

Sambært kanningini er støðan júst tann øvugta av tí, hon var fyri einum lítlum ári síðani.

Ein kanning í mars í fjør vísti, at tá vóru 53 prosent ímóti norskum ES-limaskapi, og at 47 prosent vóru fyri. Kanningar, sum bløðini Dagbladet og Nationen gjørdu so seint sum í desember, vístu eisini, at meirilutin var ímóti, at stjórnin skal senda umsókn til Bruxelles um limaskap.

Formaðurin í norsku Evroparørsluni, Sigurd Grytten, er sera væl nøgdur við úrslitið av nýggju kanningini. Hann tók við sum formaður í apríl í fjør og fegnast um, at hetta er fyrstu ferð í hansara formanstíð, at meiriluti er fyri ES-limaskapi.

Sigurd Grytten heldur, at norðmenn eru ávirkaði av teimum stóru broytingunum, sum henda í Evropa. Sjálvur heldur hann, at tað nýggja felags evropeiska gjaldoyrað, evran, hevur vakt ans í Noregi, eins og fleiri norðmenn síggja fyrimun í at fara uppí, nú ætlanin er at víðka ES eystureftir.

Formaðurin í rørsluni, sum virkar ímóti norskum ES-limaskapi, tekur undir við, at evran uttan iva hevur ávirkað norðmenn, men Sigbjørn Gjelsvik heldur kortini, at tað er ov tíðliga at gera nakra niðurstøðu út frá einari kanning.

### Sama politiska býtið

Kanningin, sum nú vísir greiðan norskan meiriluta fyri ES-limaskapi, varð gjørd í síðstu viku.

Hon vísir, at av kvinnunum er ein lítil meiriluti ímóti limaskapi, meðan flestu menn eru fyri. Í Norðurnoregi hevur mótstøðan ímóti ES-limaskapi altíð verið stór, men nýggja kanningin avdúkar, at munurin nú er lítil har.

Verður hugt at floksbýtinum, er myndin framvegis tann, at veljararnir hjá Arbeiðaraflokkinum og Høgra eru fyri ES-limaskapi. Framburðsflokkurin hevur higartil ikki viljað tikið støðu í ES-málinum, men sambært nýggju kanningini tekur meirilutin av veljarum floksins undir við limaskapi.

Úr Norðurlondum:
## Staturin skal rinda skattamál

Danskir skattgjaldarar, sum halda seg hava verið fyri órætti í skattamálum, skulu nú fáa allan sakarmálskostnaðin endurrindaðan, vinna teir eina sak ímóti almennu skattamyndugleikunum.

Tað hevur n˝ggi skattamálaráðharrin, Svend Erik Hovmand, skotið upp. Hann sigur, at ein skattgjaldari eigur ikki at hava útreiðslur av einum sakarmáli, vinnur hann sakina ímóti tí almenna.

Sambært ráðharranum hendir tað ofta, at fólk aftra seg við at royna eitt trætumál í rættinum, tí tað er so dýrt og tekur ofta drúgva tíð. Tað finnast eisini fleiri dømi um, at rokningin frá sakføraranum er størri enn tann skatturin, sum fólk fáa afturgoldnan. Og tað kann ikki vera rætt, sigur Svend Erik Hovmand.

## Svii í Taliban

Svenska stjórnin váttaði í gjár, at ein svii er millum fangarnar, sum amerikanarar hava flutt úr Afghanistan til Kuba. Maðurin er tó ikki svii av uppruna, men svenskur ríkisborgari.

Uttanríkisráðið í Stockholm sigur, at amerikanarar kunnaðu svensku stjórnina um, at ein maður við svenskum passi er millum fangarnar í Guantanamo á Kuba. Stjórnin umhugsar nú at senda ein sakførara til Kuba at hjálpa manninum, sigur Anna Lindh, uttanríkisráðharri.

Sum skilst hevur maðurin verið uppi í al-Qaeda, men sviar ætla kortini at royna at fáa mannin til Svøríkis.